Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 25/00495 Broyting av býarætlan undir Gøtueiði

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.11.2025 | 34/25 | 25/00495-1 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 59/25 | 25/00495-1 |

# BROYTING AV BÝARÆTLAN UNDIR GØTUEIÐI

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur í longri tíð verið við at menna og skapa betri karmar fyri vinnuvirksemi undir Gøtueiði. Í tí sambandi er tørvur á at umskipa eitt ávíst øki ovast í bygdini soleiðis, at tað kann nýtast til léttari vinnu, tænastur og møguliga ferðavinnu.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin við málinum er at umskipa grundøkini ovast í bygdini til vinnuøki í umhvørvisflokki 1 og 2. Hetta ger tað møguligt at nýta økið til m.a. hotellvirksemi, handilsvirksemi og annað líknandi léttari vinnuvirksemi. Umskipanin er í samsvari við heildarætlanina fyri Undir Gøtueiði.

Økið er staðsett soleiðis, at tað liggur væl fyri til ætlaða vinnuvirksemi og er uttan fyri verandi bústaðarøki. Ferðslan, sum fylgir við virkseminum, verður sostatt leidd uttan um bústaðarøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fyri økið eru galdandi hesi verandi ásetingar:

## § 3. Ásetingar fyri øki B: Bústaðarøki.

1. Økið umfatar gomul og nýggj bústaðarøkir.

Loyvt er at nýta hús til handlar, smærri vinnuendamál, ið kunnu staðsetast millum bústaðir og stovnar treyta av at hetta ikki er til ampa (t.d. við øktari bilferðslu), ell økinum sum sethúsabýlingur. Bústaðarøki er umhvørvisflokkað í 1. flokki, sí Umhvørvisflokking fyri Eysturkommunu.

2. Á grundstykkjum minni enn 300 $m^2$ verður byggiloyvi ikki givið. Tó eru undantøk fyri grundøki, eldri enn 1. januar 2012.

Byggistigið fyri grundstykki uppá 300 $m^2$, verður sett til 0,4 og lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjastødd til 0,3 fyri 500 $m^2$ og størri.

3. Um verandi bygging á grundstykkjum minni enn 500 $m^2$ verður niðurtikin kann bygdarráðið loyva, at nýbygging fer fram í somu stødd sum undan farna bygging ikki er til ampa fyri grannaognir.

4. Hús mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønuna, mált frá miðal jørðildi. Byggivaldið ásetur kotuna á lægsta gólvi. Tá møn á húsum er útið á s bygningum, kann byggivaldið krevja at frástøðan til grannamark er í minsta lagi 5 metur.

5. Eftir góðkenning frá byggivaldinum verður loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nýtímans nýts

Fylgjandi verða nýggju ásetingarnar fyri økið:

## § 2. Ásetingar fyri øki A: Miðstaðarendamál.

1. Økið verður lagt burtur av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarstovur, bústaðir, stovnar o.t., ið hóskar inn í eitt miðstaðarøki.

Nýtslan av byggingini í veghædd, har miðstaðarbyggingin verður mett at verða, skal hava útatvenda nýtslu, ið hóskar inn í eina miðstaðarbygging.

2. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5. Byggivaldið kann seta treytir í mun til hæddir í veghædd og á 1. hædd, ið passa til miðstaðin.

3. Bygningar skulu ikki verða hægri enn 7m til yvirgrindina og 10m til mønuna, mált frá miðaljørildi (í miðal við húsahornini). Bert ein kjallarahædd er loyvd.

4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað økið. Í serstakari byggisamtykt kann by

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um øki, sum í dag er partur av B – Bústaðarøki, hetta krevur at býarætlanin fyri økið má broytast til A – Miðstaðarøki. Umskipanin fevnir um hesar matriklar undir Gøtueiði:

- 281c, 281d, 281e, 281f, 281g, 281h, 281i og 281k og umleið 1300 fermetrar av matr. nr. 281a

Kloakk, vatn, el og aðrir tekniskir skipanir eru í løtuni ikki framlagdir til økið. Harumframt er vegurin til økið ikki gjørdur liðugur.

**Skjøl**
Viðfest er skjal nr. 251117_BS_EK-Undir Gøtueiði

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 5.000.000,- kr. (meting um vegur skal gerast) |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við omanfyri broytingum og at seta hesar í verk. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. november 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini